Eysturoyar- og Sandoyartunlar P/F
Bryggjubakki 4
100 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 6. januar 2016
Málsnr.: 15/00388-18
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Árinsmeting og góðkenning**

P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar vendi sær hin 17. juli 2015 til Umhvørvisstovuna viðvíkjandi møguligum krøvum í sambandi við, at felagið skal byggja tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy og millum Suðurstreymoy og Sandoy. Greitt varð millum annað frá, at útfyllingar skuldu gerast út á sjógv bæði við Sjógv á Strondum og innanfyri Saltnes á Skálafjørðinum.

Hin 4. september 2015 bað Umhvørvisstovan um meira tilfar sambært §21 í havumhvørvis-verndarlógini[1], sum ásetur, at verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka umhvørvið munandi, ikki kunnu verða framdar uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Biðið varð um at fáa eina ferðslulýsing fyri ávikavist Saltnes og við Sjógv, býtt upp eftir akfarsstøddum, samanborið við í dag. Harafturat varð biðið um eina fakliga óhefta lívfrøðiliga meting av náttúrviðurskiftunum í sjónum við Saltnes og við Sjógv, sum legði dent á at viðgera, um verkætlanin kann hugsast at gera seg inn á serstøk ella møguliga høtt plantu- ella djórasløg.

Hin 21. oktober 2015 fekk Umhvørvisstovan tilfar hesum viðvíkjandi og sendi felagnum viðmerkingar til hetta 9. november 2015 við umbøn um nakrar útgreiningar afturat. Hetta fekk Umhvørvisstovan lutvíst 24. november 2015 og 17. desember 2015.

Alt tilfarið snýr seg um tunnilin millum Skálafjørðin og Suðurstreymoynna.

Við tilfarinum hin 21. oktober 2015 fekk Umhvørvisstovan eina lýsing av náttúru og umhvørvisviðurskiftunum við Saltnes og við Sjógv, nevnd: “Umhvørvislýsing við Sjógv, Stendur og Fláhellu, Runavík”. Hetta er ein lívfrøðilig lýsing av botninum, har ætlanin er at fylla tilfar út á sjógv til vegir og runtkoyringar norðanfyri Saltnes og við Sjógv á Strondum.
Kanningin hevur eina stutta lýsing av, hvørji botnsløg eru og hvørjar plantur og hvørji djór finnast á botninum.

Kanningin staðfestir, at bæði økini í ein ávísan mun longu eru rørd í sambandi við vegagerð, og at einki sjáldsamt slag (djór ella planta) ella serligt lívfrøðiligt fyribrigdi varð staðfest á hesum støðum.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum

**Niðurstøða**

Út frá hesum metir Umhvørvisstovan ikki, at ætlaða útfyllingin út á sjógv fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, og hevur tí, sambært § 21, stk. 4 í havumhvørvisverndarlógini tikið avgerð um, at tað ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting  sambært § 21, stk. 2 í lógini. Sambært §18 í fyrisitingarlógini[2] metir Umhvørvisstovan heldur ikki, at neyðugt er við partshoyring, tá avgerðin gongur felagnum á møti.

Vinarliga

Ingvard Fjallstein, málsviðgeri

[2] Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo